# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Hatta er øsandi, og teir eiga ikki at gera tað aftur*
*(USA um rakettroyndina hjá Norðurkorea).*



*Illir suðurkoreanar brenna myndir av norðurkoreanska leiðaranum Kim Jong-Il, tá tíðindini um rakettroyndirnar frættust*
*Mynd: Reuters*

# Øði um norðurkoreanskar rakettroyndir

**– Hatta er øsandi, og Norðurkorea eigur ikki at endurtaka tað, sigur talsmaðurin hjá Hvítu Húsunum**

RAKETTROYND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hóast ávaringar úr fleiri londum royndu norðurkoreanar seks rakettir í gjárkvøldið, og sambært amerikanarunum var í einum føri talan um eina langtberandi rakett, sum kann røkka málum í Alaska. Tann rakettin var 35 sekund í luftini, áðrenn hon sprongdist og datt niður í Japanska Havið eins og hinar fimm.

USA fordømdi alt fyri eitt royndirnar, og trygdarráðgevin Stephen Hadley segði tær vera øsandi. Tað sama segði talsmaðurin hjá Hvítu Húsunum, Tony Snow, sum samstundis ávaraði Norðurkorea ímóti at royna fleiri rakettir.

Russland og Suðurkorea eru eisini í øðini um rakettroyndirnar, og suðurkoreanska stjórnin vil hava Norðurkorea aftur til samráðingarborðið alt fyri eitt, so samráðingarnar um landsins kjarnorkuætlan kunnu takast uppaftur. Tær slitnaðu, tí Norðurkorea vildi ikki samráðast, fyrr enn USA ógildar síni handilstiltøk ímóti landinum.

Japan krevur nú, at rakettroyndirnar í gjárkvøldið verða viðgjørdar í trygdarráðnum hjá ST. Tað sama sigur Avstralia, sum harafturat sigur seg stúra fyri, at rakettroyndirnar í gjár verða ikki tær seinastu, men at fleiri koma afturat teir næstu dagarnar.

# Taparin krevur umteljing

**Hóast bæði forsetavalevnini høvdu lovað at viðurkenna úrslitið av meksikanska forsetavalinum, krevur taparin nú umteljing**

MEKSIKO
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Meksikanska forsetavalið gjørdist so javnt, sum roknað varð við.

Valnevndin kunngjørdi í gjár, at tann konservativi Felipe Valderón hevði vunnið valið, men at munurin millum hann og sosialdemokratin Andres Manuel Lopez Obrador var minni bara eitt prosent ella umleið 400.000 atkvøður.

Undan uppteljingini høvdu Valderón og Obrador lovað, at teir fóru at viðurkenna úrslitið, sama hvussu lítil munurin teirra millum bleiv, men nú hevur pípan fingið annað ljóð. Obrador kunngjørdi í nátt, at hann viðurkennir ikki úrslitið, fyrr enn allar atkvøðurnar eru taldar umaftur. Viðhaldsmenn hansara hava samstundis lagt valnevndina undir svik.

Politiskir eygleiðarar í Meksiko siga, at tað javna úrslitið var tað ringasta, sum kundi henda. Teir bera ótta fyri, at flokkurin hjá Obrador fer at skipa fyri mótmælisgongum, sum lættliga kunnu savna fleiri milliónir fólk í gøtunum teir næstu dagarnar.

Enn hevur valnevndin ikki svarað, um hon er sinnað at telja tær umleið 40 milliónir atkvøðurnar eina ferð afturat.

## STUTT SAGT

### Turkaland ikki upp í ES

Tann katólska kirkjan leggur seg nú út í orðaskiftið um turkiskan limaskap í Evropasamveldinum.

Ein talsmaður hjá kirkjuni, kardinalurin Walter Kasper, sigur við italska blaðið Corriere della Sera, at álopini á kristnar prestar í Turkalandi vísa, at tað eru ikki bert landsins lógir, sum forða fyri, at landið kann koma upp í ES. Hugsunarhátturin hjá fólki er ein uppaftur størri forðing enn lógin, sigur kardinalurin. Hildið verður, at orð hansara samsvara rættiliga væl við tað, sum Benedikt pávi heldur um turkiskan limaskap í ES, tí pávin hevur fyrr ávarað ímóti at taka Turkaland uppí.

Seinasta sunnudag varð ein franskur prestur álopin í turkiska býnum Samsun, og fyri trimum mánaðum síðani varð ein týskur prestur skotin í einum øðrum turkiskum býi.

### Á seinastu ferðini

Gamla norska ferðamannaskipið ”Norway”, sum eisini hevur itið ”France”, er nú komið til India, har tað skal høggjast upp.

Greenpeace og aðrir umhvørvisverndarfelagsskapir vilja vera við, at meiri enn 900 tons av asbesti eru í skipinum, og at tað tí er vandamikið at fara umborð at høggja skipið upp, fyrr enn asbestið er fingið úr tí. Málið hevur verið heilt uppi í indiska hægstarætti, sum hevur gjørt av, at tað er nóg trygt hjá upphøggjarunum at fara umborð.

”Norway”, sum er 45 ára gamalt, er 315 metrar langt og 46.000 tons. Norska reiðaríið Norwegian Cruise Line keypti tað í 1979. Í dag eitur skipið ”Blue Lady”.

### Gamli Bush í Íslandi



Fyrrverandi amerikanski forsetin George Bush kom í gjár til Íslands at hátíðarhalda amerikanska tjóðardagin, og í gjárkvøldið var hann og vitjaði íslendska forsetan, Ólav Ragnar Grímsson.

Í dag skuldi Bush royna seg við laksatráðuni, og tað var eingin annar enn formaðurin í fiskiverndarráðnum í Norðuratlantshavinum, Orri Vigfússon, sum hevði boðið gamla forsetanum at royna veiðieydnuna í íslendsku laksaáunum.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at George Bush vitjar í Íslandi, og tað er heldur ikki fyrstu ferð, at hann er við laksatráðuni. Sum varaforseti hjá Ronald Reagan var Bush í Íslandi, og tá veiddi hann eisini laks, skrivar blaðið Vísir.

### Vorðið sum toskur

Letlendski ferðamaðurin Andries Lapsim gjørdist ikki sørt kløkkur, tá hann í gjár var við toskatráðu, nú hann heldur summarfrí í Noregi.

Brádliga kendi hann, og tað var honum greitt, at talan var um ein stóran fisk. So var, tí tá Andries Lapsim hálvan annan tíma seinni fekk fatur á fiskinum, vísti tað seg at vera ein toskur, sum var 143 centimetrar langur og vigaði 28,7 kilo, skrivar Nordlys.

Hetta er fyrstu ferð, at tann hepni letlendski ferðamaðurin vitjar Noreg. Um tað er av tilvild, at hann hevur valt staðið, har hann gistir, sigur søgan einki um, men tað er í hvussu er væl kent. Andries Lapsim heldur summarfrí í Oldurdalinum.